SOSIALURIN

Nr. 51 — 2. JULI 1966 — 39. ÁRG.

Landshúsarhaldið

TÁ IÐ TALAN ER UM KOSTNAÐIN AV LANDSHÚSARHALDI OKKARA, ER FYRST AT MINNAST TIL, AT HESIN KOSNAÐUR ER NØKURLUNDA JAVNT BYTTUR MILLUM FØROYAR OG DANMARKAR — FØROYAR BERA HIN STØRSTA PARTIN. Í VISSUM FØRUM BERA DANIR ALLAN KOSTNAÐIN OG Í VISSUM FØRUM FØROYAR ALLAN

Niðanfyri hava vit mynd av, hvussu hesin kostnaður er øktur hesi seinastu árini — fyrsta árið er tá ið seinasta landsstýri tók við; í 1963—64 hevur hetta landsstýrið tikið við.

Vit skulu her endurgeva tølini, ið samsvara myndini og vísa á, hvat landskassin og rikiskassin hvør sær hava goldið av landshúsarkostnaðinum.

1000 kr.:	landsk.	rikisk.	ialt
1958/59	16.857	14.833	31.690
1959/60	20.680	15.991	36.671
1960/61	21.403	19.498	40.901
1961/62	26.969	22.340	49.309
1962/63	30.165	27.446	57.611
1963/64	36.051	35.933	71.984
1964/65	43.927	39.125	83.052

Fyri seinasta árið á myndini — 1964/65 — er eingin roknskapur kunngjørdur; har verður sostatt bara ætlað eftir figgjarlógaruppskotinum.



HON skrivar

DEMOKRATIIÐ — EISINI FYRI KONUFÓLK Í VERKI

Vit liva í einum demokratiskum samfelag við skrásettum javnbjóðis rætti til øll at taka lut í stjórnarviðurskiftum landsins, annaðhvørt hetta er kommunalt ella landsumfatandi; men hvussu hevur hetta roynst okkara kvinnum? Í kommunustýrum hevur verið úrlagi ringt, og hóast valrættur okkara kann føras aftur til 1915, so er tað nóg illa hent, at vit kvinnur hava verið umboðaðar í sóknarstýri ella býráð. Á tingi hevur tað verið uppaftur verri. Tað er ongatið hent, at kvinna er vald á ting. Tá vit fyri nøkrum árum síðan sóu, at ein kvinna slapp innum tinggátt, var hetta bert sum tiltak hjá løgtingsmanni, ið var burturstaddur.

Hvørjum skulu vit geva skuldina fyri hesa ómegd? Monnunum ella kvinnunum sjálvum? Eg kann ikki lata vera við at mynta ein part av skyldini uppá mannfólkini; men høvuðsskuldin liggur avgjørt hjá okkum kvinnum sjálvum, ið hava verið alt ov litilætnar, ov lítið framligar, ov raskar í munninum, men ov linar í kongunum. Bæði lands- og lokalpolitikkur viðkemur okkum. LAT OKKUM GERA NYTTU BURTUR ÚR DEMOKRATISKU RÆTTINDUM OKKARA!

BRÆVkassin

Sosialurin.

Ein fyrispurningur:
Fyrispurningur min hevur sam band við teir so nógv umrøddu Portugalstrolararnir. — Kann blaðið siga mær, hvussu vórðu gjaldoyrisviðurskiftini greidd í hesum máli?

Við tøkk fyri svarið,

fiskimaður.

SVAR: Handilsjavnvágin Danmarkar og Portugals millum var vorðin tann, at Portugal skyldaði Danmark 12 milj. kr. Viggo Kampmann bjóðaði føroyingum henda ágóða, ið svaraði til upprunaliga kostnaðin av 3 trolarum. Teir komu at kosta hitt tvífalda; men hesin meirakostnaður varð eisini greiddur umvegis danska handilssambandið við Portugal — sjálvir áttu vit **einki** portugisiskt gjaldoyra.

M **DEBES OG HANS PAULI**
O Skjótt bløðini eru ov lítil,
L Debes krevur stóra aulu
A at greiða fólki nærri frá
R tunnunum hjá Hans Pauli.

Veitst tú

AT gomlu orðini »skild frá borði og song« merkja ikki tað sama sum skilsmissa; men merkja meira tað, at fólk eru separerað við møguleika at koma saman aftur.

AT skalpering ikki bara fór fram millum indianarar í Norðurameríka. Í fornøldini var hesin siður væl kendur hjá einstøkum fólkasløgum bæði í Europu og Asiu.

AT í teim sonnu, gomlu universitetunum varð undirvist í teimum »sjey fríu kunstunum«. Hesir vóru: grammatikk, retorik, logik, aritmetik, geometri og musikk.

AT tær flestu kolibriur kunnu syngja, men nógvar av teimum syngja við tónum, ið liggja so høgt, at teir ikki kunnu uppfatast við fólkaoyrum.

AT einstøk fólk eru før fyri at hoyra ljóðið fra norðlýsinum og siga, at hetta minnir um hvinið frá einum piski ella vindferðina gjøgnum rigningin á einum skipi.

AT á einstøkum økjum úti við sjógvin í USA noyðast bøndurnir at klippa velið av hønum, so tær ikki fara av vindi.

AT tær flestu insektir hava seks bein; men bara trý av teimum nerta við jørðina í senn, tá tær ganga.

KIKKARIN

ÁÐRENN 8 ÁRA BRØÐRALAG

Undan valinum í 1950, sum førdi við sær, at sambands- og fólkaflokksmenn hálsfevndust, kundi ein lesa í

DAGBLAÐNUM«:
»Høvuðsmál okkara í føroyskum politikki er at reka sambandsmenn úr øllum álitissessum her á landi.«

— — —

»DIMMALÆTTING«:
»Vil De lege med sprællemænd, skal De kun stemme på folkeflokken, men andet end spræl får De ikke ud af det.«

SMÁSKEMT

— Við tygara fysikki liva tygum lættliga, til tygum eru 90.

— Men, góði tygum, 90 havi eg longu fylt.

— Ja, har kunnu tygum siggja: rætt segði eg!

VÆL SAGT:

Elektroniskar forhondsútrokuningar av úrslitinum av einum valí kunnu nú gerast so væl, at tað er óneyðugt at hava val.

* * *

Tá ein maður skrivar sítt eftirmæli, er tað fyri at reinsa seg. Tá ein kvinna ger tað, er tað fyri at hevna seg.

* * *

Fyri kvinnuni er tað lættari at verja sínar dygdir fyri monnunum enn sítt rykti fyri kvinnunum.

(Rochebrune)

Rímsmiðjan

SMIRILIN

Menn tjakast nú dúgliga um byggjanina av nýggja Smirli, og hvussu henda byggjan endaliga kom í lag.

Tað er lygn,
at Kjartan slapp at siggja,
hvat aðrir hovdu bjóðað
upp á Smiril nýggja,
ti sjálvt um menn
teir friggja,
ikki altið alt
sleppa teir at siggja;
teir eru bara góðir,
knýta kærleiksbond
og kroysta væna sprundið
í sítt »hulu hond«.

— Hevur ein ongar pengar, má ein spara; men tað er tíverri lættari at spara, tá ein hevur pengar!

* * *

Bóndin fylgdi sýslumanninum og soni hansara millum bygdirnar. Á leiðini settust teir at hvíla. Tá letur í bóndanum:

— Her sita triggir vísir menn.

— Ja, vissuliga tað, svarar sýslumaðurin, og bóndin leggur aftrat:

— Eg eri vegvísur, tygum eru rættvísur og sonur tygara er næsvísur!

* * *

Tvær havnarkonum práta:

Petrina: Nú bara teir lovað okkum at fáa so gott og vælsmakkandi vatn, — sum eg gleði meg.

Gina: Aje, tað hava vit longu fingið. Eg fekk mær ein vatnsopa íáðni — finasta baðivatn! — Indisligt!

Petrina: Baðivatn?

Gina: Ja, tú baðivatn; men eg haldi kortini, at tað var brúkt.

Fólkaheimið Føroyar

Full trygd móti at eingin liður trot ella sakn ella kemur illa fyri, tá ið arbeiðsloysins forbannilsi leikar á!

hvønn dag okkurt til gamans

Krossorð:



Yvir: 1) likamslutur 7) á potti 8) bindiorð 10) tveir eins 11) italskur býur 14) ávísingarforn. 15) tíð 16) agn 18) økist.

Niður: 2) brøl 3) vasaði 4) ei 5) aftari 6) avgudur 9) drykkur 12) fiskur 13) røkka 17) partafelag.

5 spurningar

1. Nær doyði Alexander Mikli?
2. Nær var Ellindur bispur?
3. Nær gjørdist Egypt enskt hjáland?
4. Nær hendi sameining Týsklands?
5. Hvar er prestagarðurin Ónagerði?

(Svar aðrastaðni)

BORT ÚT

* eru tað ikki smædnir menn,
* sum slíta eitt landsstýri, tí teir
* ongan meiraluta hava aftan-
* fyri seg og hava verið í hóslag við menn, ið eru ómøguligir ir at arbeiða saman við og so
* slakar triggjar mánaðir seinri
* fylkja landsstýrið aftur við
* somu monnum, sum um einki
* var hent.
* KUNNU VELJARNIR SPEIREKAST MEIRA FULLKOMULIGA??

hugskot

MINUTOLOGI

Franskur studentur við lærda háskúlan í Sorbonne hevur skrivað doktaraviðgerð um, hvat hendir í heiminum eftir **1 MINUTTI.**

Úrslitið er hetta:

330.540 koppar av kaffi fara í mannakroppar.

8.230 metrar av líti fara uppá konufólkavarrar.

752 hjún verða vígd, 235 verða fráskild.

2,5 milj. tons av koli verða brotin upp.

24.340 l av víni verða druknir.

9.236 kg av kjøti verða etin.

1.842 fjarrit verða send.

Hjartað ger nóg mikið arbeiði til, at tað kundi tveitt ein mann 2,5 m.

BØRNIN

NØVN. Set bókstavirnar annarleiðis saman og tú fært:

1) **TRULOAPG** = **land**
2) **NISEHKIL** = **høvuðsstaður**
3) **ARKKISO** = **oyggj**

* * *

1— 5 = læra
4— 6 = gav
6— 9 = hjálpa
10—11 = hvin
1—12 = starvsmaðurin

hvønn dag okkurt til børnini

LOYNDARORÐ

Tá orðini niðureftir eru rætt funnin, fært tú á 2. og 4. reglu tvinni ólik veðurløg.



1) frii 2) gliður 3) køksamboð 4) mannsnavn 5) lýsti 6) mat 7) tos.

* * *



1 = hjáljóð
2 = friður
3 = heiður
4 = blóma
5 = ekur

SKULA TIT BRUKA BIL

persónkoyring ella skúlakoyring, so snarið **tlf. 3456**

Alexander Dalfoss